# Hetta var Com-Data, nú kemur Senta ...

**Væl umtókti Com-Data álmanakkin er nú komin í nýggjum hami.**




## Álmanakkin er ókeypis og fæst á hesum støðum:

Senta, Brekkutún 4, Tórshavn
City, Smyrilsvegur 7, Tórshavn
City, Stangavegur 53, Klaksvík
City, Heiðavegur 100, Saltangará
Casa, Smyrilsvegur 5, Tórshavn
Føroya Bjór, Akranesgøta 10, Tórshavn
Føroya Bjór, á Drelnesi, Trongisvágur
Føroya Bjór, á Mølini, Skálavík
Kunningarstovan, Tvørávegur 37, Tvøroyri
Kunningarstovan, Vágsvegur 22, Vágur
Kunningarstovan, Sandur
Kunningarskivan, Flogvøllurin, Sørvágur
Sendistovan, J. Paturssonar gøta 32-34, Tórshavn
Atlants Tøkni, Grønlandsvegur 38, Tórshavn

SENDISTOVAN

BETRI STÝRING. STØRRI VINNING.

SENTA®

Tlf. +298 347 200 · www.senta.fo



FVE **FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**
The Faroe Islands Fisheries Inspection



# ENDURLÝSING 1. MEISTARI TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Tvey føst størv sum 1. meistari við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys, at seta sum skjótast.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer).
- Fyrimunur við 3 ára maskinmeistaraútbúgving
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa
- Aldur og heilsu til at gerðast vinnukavari. Fyrimunir men ikki krav.

**Starvsheiti er 1. meistari.**

**Setanartreytir:**
Størvini er tænastumannastørv og lønt í 31. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarfelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnum undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við: CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 11. januar 2008 klokkan 14.00.

**Umsóknirnar skulu sendast til:**

**Fiskiveiðieftirlitið**
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu. Henda lýsing er eisini á heimasíðuni www.fisk.fo

www.fisk.fo


W W W . S O S I A L U R I N . F O